| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>28. mai 2009 | Blað nr.: 7921<br>Formansins merki: |
|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** **28. mai 2009** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 96/09-128/09**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Ingrid Henriksen
Sjúrður Johannesen
Annfinn Brekkstein
Inga Dahl
Jan Christiansen

**LUTTÓKU IKKI:**
Elin Lindenskov
Levi Mørk
Vagnur Johannesen
Sjúrður Olsen
sum høvdu boðað frá at teimum barst frá at møta
Maria Hammer Olsen, ið var uttanlands

**LUTTÓKU EISINI:**
Bjørgfríð Ludvig
Jákup E. Hansen

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Heri Olsen

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00**

**99/09** **2009-1366**

**Elin Lindenskov hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Ingrid Henriksen, eru loknar.

**Býráðið 28. mai 2009:** Góðkent.

**100/09** **2009-1366**

**Levi Mørk hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Sjúrður Johannesen, eru loknar.

**Býráðið 28. mai 2009:** Góðkent.

**101/09** **2009-1366**

**Vagnur Johannesen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Inga Dahl, eru loknar.

**Býráðið 28. mai 2009:** Góðkent.

**102/09** **2009-1366**

**Sjúrður Olsen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Gunnar Mohr, eru loknar.

**Býráðið 28. mai 2009:** Áheitanin er tikin aftur.

**103/09** **2009-0387**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 28. mai 2009:** Tikið til eftirtektar.

**104/09** **2009-0830**

**Umbøn um eykajáttan til Hoyvíkar skúla**

Í august 2009 byrja tríggir 8. flokkar í Hoyvíkar skúla. Skúlin hevur ikki havt 8. flokk frammanundan.

Í játtanini fyri 2009 til Hoyvíkar skúla er hædd tikin fyri, at tríggir 8. flokkar verða í skúlanum, men hædd er ikki tikin fyri stovningarútreiðslum til hesar flokkar. Skúlin hevur ikki havt 8. flokk fyrr, og tí er neyðugt at keypa útgerð til alisfrøði, stólar og borð til ein flokk, flokksett av bókum til allar lærugreinar, orðabøkur og tilfar til bókasavnið.

Útreiðslurnar at stovna tríggjar 8. flokkar í Hoyvíkar skúla eru mettar til kr. 459.000.

Umsitingin hevur roynt at funnið peningin á økinum. Møguleiki er at taka av kontunum hjá Hests skúla, Velbastaðar skúla, Hoyvíkshøllini og Kvøldskúlanum.

Hests skúli ( konto 20 ) hevur yvirskot frá undanfarna fíggjarárið, og skúlin megnar at halda játtanina hóast tikið verður av kontuni.

Velbastaðar skúli ( konto 22 ) játtanin til reingerð varð av óvart hækkað ov nógv í ár.

Hoyvíkshøllin ( konto 291) hevur eina minninýtslu í 2008, og mælt verður til at flyta alla minninýtsluna til Hoyvíkar skúla.

Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli ( konto 31 ). Skúlin hevur eina stóra minninýtslu í 2008. Skúlin hevur ikki loyvi at flyta ímillum ár. Mælt verður tó til, at kr.150.000 av minninýtsluna verða fluttar til Hoyvíkar skúla.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at eykajáttan á kr. 459.000 verður veitt Hoyvíkar skúla til stovningarútreiðslur til tríggjar 8. flokkar, og at eykajáttanin verður tikin av hesum kontum:

| | | |
|---|---|---|
| av konto 20 | Hests skúli | 30.000 kr. |
| av konto 22 | Velbastaðar skúli | 50.000 kr. |
| av konto 33 | Felags skúlamál | 50.000 kr. |
| av konto 291 | Hoyvíkshøllin | 179.000 kr. |
| av konto 31 | Kvøldskúlin | 150.000 kr. |

**Mentamálanevndin 1. apríl 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt, við 5. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2009, at taka undir við fíggjarnevndini og at hækka konto 29 við 459.000 kr.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**105/09** **2009-1188**

**Oman Mattalág – nýtt navn til ovara partin av gøtuni**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Av tí at gøtan 'oman Mattalág' er í tveimum, verður mælt til at finna nýtt navn til ovara partin. Niðari parturin hevur innkoyring frá Jákup Nolsøesgøtu, og mælt verður til, at hesin partur varðveitir navnið *oman Mattalág*. Ovari parturin hevur innkoyring frá Íslandsvegnum, og mælt verður til, at hesin partur fær nýtt navn.

**Gøtunavnanevndin 28. apríl 2009:** Gøtunavnanevndin mælir til at nevna vegastrekkið við innkoyring frá Íslandsvegi *Grímsoyarvegur* eftir íslendsku oynni Grímsey, av tí at talan er um síðuveg til Íslandsveg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 13. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**106/09** **2009-1188**

**Dalavegur – nýggj nøvn til tvey strekki, sum áður hoyrdu til 'gamla' Dalavegin**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Talan er um tvey vegastrekki, sum áður vóru partar av 'gamla' Dalavegnum.

Tekniska umsitingin hevur tikið avgerð um, at Dalavegur gongur niðan til ringvegin, og at tey tvey vegastrekkini:

- frákoyring frá Dalavegnum til høgru
- Dalavegurin oman fyri ringvegin
-

skulu hava nýggj nøvn.

Heitt er á gøtunavnanevndina um at finna nøvn til hesi bæði vegastrekkini.

**Gøtunavnanevndin 28. apríl 2009:** Gøtunavnanevndin mælir til at nevna tað niðara vegastrekkið, sum er frákoyring frá Dalavegnum til høgru, *Dalastígur*. Tað ovara vegastrekkið, sum er oman fyri ringvegin, mælir nevndin til at nevna *Hjaltarók*. *Hjalti* er annað orð fyri 'hetlendingur'. Samanber við Skotarók og Írarók í grannalagnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 13. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**107/09** <u>**2008-3308**</u>

<u>**Gøtunavn til byggingina undir Kongavarða**</u>

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Áheitan er komin frá Teknisku deild um, at gøtunavnanevndin finnur eitt navn - møguliga tvey nøvn – til nýggja býlingin á Argjum.

Í skrivi , dagfest 24. juni 2008, mælir Eigarafelagið undir Kongavarða til, at øll verkætlanin fær navnið 'undir Kongavarða'. Í skrivinum sigur eigarafelagið m.a.
- "Tí mæla vit til, at vegurin á hesum øki fer at eita "undir Kongavarða." – og "Fatan okkara er, at bert hetta eina gøtunavnið eigur at vera, og lagt eigur at verða upp fyri, at øll verkætlanin fær navn og nummar eftir hareftir, soleiðis at øll støk hús fáa egið nummar, og hvør íbúðarblokkur fær sítt nummar við frámerki til einstøku íbúðirnar, t.d. undir Kongavarða 117,3A."

Í løtuni flyta fólk inn í hús í 1. byggistigi, men 2. byggistig er eisini í verkætlanini (sí kort), og tá tað er liðugt, verða tveir vegir til økið. Tí metir tekniska umsitingin, at gøtunavnanevndin møguliga eigur at finna tvey nøvn til økið.

**Gøtunavnanevndin 28. apríl 2009**: Á fundinum varð kunnað um, at tað bert verður ein íbinding í Glyvursveg, og tískil er bert tørvur á *einum* navni. Gøtunavnanevndin tekur undir við eigarafelagnum, at alt økið fær navnið *<u>undir Kongavarða.</u>*

Gøtunavnanevndin viðmerkir, at tað hevði verið betri, um nevndin fekk málið fyrr til viðgerðar. Best var, um tað gjørdist siðvenja, at Gøtunavnanevndin fekk áheitan um at koma við uppskotum um nøvn, so skjótt sum ein útstykking var fyri. Annars er vandi fyri, at fólk sjálv seta navn á, og tá er ringt at venda við aftur, um navnið hevur fest seg í huganum á fólki.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 13. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina

málið í býráðið.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**108/09** **2009-0381**

**Heimildarætlan millum faknevndir og umsiting**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Spurningurin um heimildarbýtið millum faknevndir og umsiting hevur seinastu tíðina verið reistur við jøvnum millumbilum.

Ein orsøk til hetta er í sambandi við kærumál hjá Lendisnevndini. Síðani henda kærunevnd varð sett á stovn í 2007 hava kærarar javnan ført fram sjónarmiðið, at umsitingin hevur ikki heimild at nokta tí tey søkja um, tí tað skal avvarðandi politiskt valda faknevnd gera. Kærunevndin í Lendismálum hevur í onkrum føri spurt um hvussu hesi viðurskifti hanga saman hjá kommununi.

Hetta sjónarmið er eisini onkuntíð ført fram av advokatum, sum umboða onkran umsøkjara – seinast í sambandi við mál nr. 2006-2128.

Leiðslan á tekniska økinum hevur umrøtt spurningin við m.a. løgdeildina, og greitt er, at tað vildi verið ein fyrimunur fyri kommununa, at tað vóru greiðar ásetingar um hvat er delegerað til umsitingina at avgreiða, ásett í eini heimildarætlan, og somuleiðis at tað verður greitt ásett hvør hevur hesa delegatiónsheimildina.

Málið um heimildir hevur eisini verið umrøtt í øðrum sambandi – nevnliga í sambandi við umrøðuna av avgreiðslutíðum fyri mál, og í hvussu stóran mun faknevndirnar skulu viðgerða slíkt, sum kann kallast vanlig avgreiðslumál.

Ongin ivi er um, at um tænastan til borgaran skal betrast við at fáa skjótari avgreiðslutíðir, er neyðugt at umsitingin fær heimild at avgreiða fleiri mál enn í dag, uttan nevndarviðgerð.

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur á fundi 2. febr. 2009 samtykt eina heimildarætlan fyri byggimál, sum umsitingin hevur fingið heimild at avgreiða uttan nevndarviðgerð. Víst verður til mál nr. 2009-0168.

Fyri at hava eina smidliga skipan á hesum øki, har tað skal bera til hjá avvarðandi faknevndum bæði at víðka um og minka um heimildirnar hjá umsitingini, er neyðugt at fíggjarnevndin sum starvsfólkanevnd, og býráðið sum evsta vald kommununar, geva faknevndunum eina standandi heimild at útdelegera heimildir til umsitingina ella at taka aftur útdelegeraðar heimildir.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til:

1. at býráðið gevur øllum faknevndum eina standandi heimild at útdelegera uppgávur á sínum umsitingarøki, sambært stýrisskipanini og fundarskipanini, til umsitingina at avgreiða
2. at faknevndirnar hvør sær gera eitt skrivligt yvirlit yvir tær heimildir, sum verða útdelegeraðar til umsitingina

3. at faknevndirnar eina ferð árliga lata býráðið og fíggjarnevndina dagført yvirlit yvir tær heimildir, sum eru útdelegeraðar til umsitingina – fyrstu ferð hin 1. apríl 2009 - og annars loypandi um allar broytingar í heimildarætlanunum.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Jóhan E. Simonsen, leiðari fyri løgdeildini hevur gjørt notat um delegatión (heimiling), sum er journaliserað.

Samtykt at leggja málið fyri býráðið til umrøðu, áðrenn støða verður tikin til tilmælið.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Býráðið umrøddi málið og beindi tað aftur í fíggjar-nevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Jógvan Arge taka undir við tilmælinum frá stjórnini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti Sjúrður Olsen tekur ikki undir við tilmælinum frá stjórnini.

**Býráðið 28. mai 2009:** Atkvøtt var um tilmæli hjá meirilutanum í fíggjarnevndini sum var samtykt við 8 atkvøðum fyri og 3 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Sjúrður Johannesen, Jákup S. Simonsen og Ingrid Henriksen. Ímóti atkvøddu Annfinn Brekkstein, Inga Dahl og Jan Christiansen.

**109/09** **<u>2002-2214</u>**

**<u>Áheitan frá kommunulæknunum í Tórshavnar kommunu um at fáa normerað 10. og 11. kommunulæknastarvið í Havn og um bygging av viðtaluhølum í Hoyvíkshaganum</u>**.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Teir 9 kommunulæknarnir í Tórshavn hava við skrivi, dagfest 26. september 2002, skotið upp og kravt, at býráðið søkir landsstýrið um at skipa fyri tveimum kommunulæknastørvum aftrat í Suðurstreymi. Tað fyrsta í 2003 og tað seinna í 2005.

Víst verður á, at vanliga metanin í norðurlondum er, at ein kommunulækni skal vera fyri hvørji 1500 fólk.

**Sosiala nevndin 8. oktober 2002:** Nevndin tekur undir við áheitanini frá kommunulæknunum og samtykti at mæla býráðnum til um fíggjarnevndina at heita á trivnaðarmálaráðið um at normera tvey kommunulæknastørv aftrat í kommununi.

Eisini samtykt at heita á byggi- og býarskipanardeildina um at útvega øki til byggjan av læknamiðstøð til 4 læknar.

**Fíggjarnevndin 17. oktober 2002:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 24. oktober 2002:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Familju- og heilsumálaráðið hevur við skrivi, dagfest 8. januar 2003, boðað frá, at ráðið ikki hevur nóg stóra játtan á fíggjarlógini fyri 2003 til at ganga umsóknini á møti.

Lagt verður aftrat, at familju- og heilsumálaráðið arbeiðir við at finna eina varandi loysn fyri kommunulæknaviðurskiftini í Sandoynni, sum møguliga fær ávirkan á kommunulæknaviðurskiftini í Tórshavnar læknadømi.

Ein møgulig nýggj normering í Tórshavnar læknadømi kann tó í fyrsta lagi vera gjørd frá 1. januar 2004, treytað av at neyðug játtan er til taks á fíggjarlógini.

**Sosiala nevndin 4. februar 2003:** Nevndin varð kunnað um málið.

**Ískoyti:**
Við skrivi, dagfest 6. mai 2003, hevur familju- og heilsumálastýrið boðað frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at biðja um hægri játtan á fíggjarlógini fyri 2004 til kommunulæknaskipanina, til tess at tvey kommunulæknastørv aftrat kunnu normerast í Suðurstreymoyar Læknadømi. Treytað av, at nevnda meirjáttan fæst, kann umsóknin frá Tórshavnar kommunu gangast á møti.

**Sosiala nevndin 10. juni 2003:** Nevndin varð kunnað um skrivið frá familju- og heilsumálastýrinum og mælti til, at peningur verður settur av á komandi íløguætlan, so farið kann verða undir at gera byggiprogramm.

**Nýtt:**
Almanna- og heilsumálaráðið hevur við skrivi, dagfest 1. juni 2004, boðað frá, at ráðið nú hevur normerað tey umbidnu kommunulæknastørvini, men at hesi ikki verða lýst leys, fyrr enn Tórshavnar kommuna hevur viðtaluhøli til taks til teirra.

**Uppskot til innstilling:**
Sosialdeildarleiðarin og trivnaðarstjórin mæla til at fyrireikingar verða gjørdar til bygging av viðtaluhølum í Hoyvíkshaganum, har øki er lagt av til endamálið, og at peningur til byggingina verður settur av á íløguætlanini fyri 2005 og 2006.

Eisini verður mælt til, at bygningurin skal kunna hýsa 4 kommunulæknum, so læknin sum heldur til í J. Paturssonargøtu eisini fær viðtalu har, og at pláss verður fyri einum møguligum 12. kommunulækna einaferð í framtíðini.

Somuleiðis verður mælt til, at hølini verða soleiðis innrættað, at læknarnir, í tann mun tað yvirhøvur ber til, verða felags um og samstarva um hølini.

**Sosiala nevndin 7. september 2004:** Ein meiriluti, Beate L. Samuelsen, Heðin Mortensen, Torfinn Smith og Hildur Eyðunsdóttir, samtykti at taka undir við tilmælinum frá sosialdeildarleiðaranum og trivnaðarstjóranum og beina málið til teknisku fyrisitingina til gerð av byggiprogrammi og at játta kr. 150.000,00 av íløguætlanini 2005.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, metir ikki, at málið er búgvi at taka støðu til, og kann tí ikki taka undir við tilmælinum.

**Nýtt:**
Býararkitekturin setti 1. juni 2005 byggibólk at gera arbeiðsskrá. Í arbeiðsbólkinum eru Kári Finnson frá byggideildini, formaður, Eyðun Jensen, deildarleiðari og Selmar Nielsen, arkitektur, ráðgevi og skrivari.

Í kunngerð nr. 64 frá 29. september 2004 um støðið, viðlíkahald, rakstur v.m av viðtaluhølum hjá kommunulæknum, verður í § 1, stk. 4, nevnt, at kommunan eigur at vísa hóskandi umhugsni fyri møguleikanum hjá kommunulæknunum at arbeiða saman við øðrum fakbólkum innan primera heilsurøkt.

Vísandi til omanfyristandandi og at henda læknaviðtala í framtíðini skal servisera ein stóran býarpart, metir byggibólkurin og býararkitekturin, at umhugsað eigur at vera at leggja fleiri funktiónir innan heilsurøkt í sama bygningi, t.d tannlækni, fysioterapi, kiropraktor v.m.

Eisini metir byggibólkurin og býararkitekturin, at umhugsað eigur at verða, um bygningurin ikki eisini eigur at rúma tveimum íbúðum til frítíðar- og langtíðar-avloysarar, sum kommunan, sambært § 6, stk. 1, í løgtingslóg nr. 28 frá 23. apríl 1999 um kommunulæknaskipan, hevur skyldu at útvega frían bústað til.

Byggi- og býarskipanardeildin hevur víst á grundøki í nýggju útstykkingini í Hoy-víkshaganum, har mest loyvda bygging er tvær hæddir á um leið 960 $m^2$. Harav eru um leið 225 $m^2$ ein arkada, sum gongur ígjøgnum niðaru hædd á bygninginum.

Býarskipanardeildin hevur gjørt serligar ásetingar fyri miðstaðarbygging fram við Karlamagnussarbreyt, sum eru góðkendar av byggi- og býarskipanarnevndini. M.a. er ein áseting, at endin á bygninginum, sum vendir út ímóti vegnum og 6 metrar inn, skal hava eina útvenda funktión, t.d. handil, matstova v.m. Í sambandi við bygging av læknaviðtalu kundi hesin partur passandi verið eitt apotek.

Av tí at læknaviðtalan helst verður fyrsti bygningurin í miðstaðargøtuni í Hoyvík, metir býararkitekturin, at Tórshavnar kommuna eigur at leggja støði undir og verða fyrimynd fyri víðari bygging í økinum.

Byggibólkurin hevur latið gjørt arbeiðsskrá og kostnaðarmeting fyri viðtaluhøli til 4 kommunulæknar, sum verður lagt fyri nevndina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og býararkitekturin mæla til, at arbeiðssetningurin hjá byggi-bólkinum verður víðkaður, soleiðis at tað í bygninginum eisini verður møguleiki fyri øðrum funktiónum innan primeru heilsurøktina. Eisini verður nevndin biðin um at taka støðu til, um bygningurin eisini skal rúma tveimum íbúðum til frítíðar- og langtíðaravloysarar.

**Sosiala nevnd 12. desember 2005:** Málið varð umrøtt, og heitir nevndin á umsitingina um at kanna, um nakar áhugi er fyri at verða partur í verkætlanini.

**Nýtt:**
Fundur hevur verið við umboð fyri Landsapotekaran, sum í skrivi, dagfest 31. januar 2006, hevur boðað frá, at Apoteksverkið er áhugað at vera við í byggiætlanini við á leið 500 $m^2$.

Eisini verður sagt, at teirra politikkur higartil hevur verið, at Apoteksverkið eigur tey høli, tey eru í, og at Apoteksverkið er sinnað at verða við í projekteringini, treytað av at avvarðandi myndugleikar góðkenna endaliga projektið.

**Sosiala nevndin 7. februar 2006:** Samtykt at arbeiðssetningurin hjá byggibólk-inum verður víðkaður, soleiðis at tað í bygninginum eisini verður møguleiki fyri øðrum funktiónum innan primeru heilsurøktina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og at játta kr. 150.000,00 til byggiprogramm og skitsuprojekt av íløgum og at velja bygginevnd.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Einmælt samtykt og at velja Elin Lindenskov og Bjarti Mohr í bygginevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur havt samskifti við ymiskar partar inna primeru heilsurøktina og metir, at Apotekið og heilsufrøðingarnir eru funktiónir, sum hóska væl inn í samanhangin.

Sambært § 11, stk. 2 í løgtingslóg frá 17. mai 2005 um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung, skal kommunan bera útreiðslurnar til viðtaluhøli hjá kommunulæknunum og heilsufrøðingunum. Umsitingin hevur havt fundir við leiðsluna fyri heilsufrøðingarnar, og eru tær áhugaðar í eini hølisloysn á veghæddini.

Apotekið er áhugað í at vera partur av verkætlanini við langtíðar leigu av um leið 550 m2 á veghæddini.

Bygginevndin og umsitingin hevur havt fleiri fundir við umboð fyri Yngru læknar, og ynskja teir, at læknaviðtalurnar verða bygdar sum eitt samanhangandi konsept við felags hølisnýtslu á øllum økjum.

Á fundi í sosialu nevnd tann 12.12.05 vóru byggitreytirnar fyri Karlamagnussarbreyt lýstar m.a. soleiðis, at mest loyvda bygging var 2 hæddir á 960 m2. Eftir at serstaka byggisamtyktin fyri økið er endaliga samtykt, er nú loyvt at byggja 865 m2 í 9,7 m hædd. Hetta gevur møguleika fyri at bygt verður í 3 hæddum.

Í viðgerðini av byggiskránni hevur bygginevndin valt at taka við 3 íbúðir til frítíðar- og langtíðaravloysarar á tilsamans 220 m2.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir sosialu nevnd til at taka undir við byggiskránni og umvegis fíggjarnevndini at mæla býráðnum til at játta 1.575.000 kr. til lendi og 3.000.000 kr. til projektering, sum verður boðin út millum ráðgevarar, og at endaliga verkætlanin verður boðin út í heildararbeiðstøku.

Somuleiðis mælir bygginevndin sosialu nevnd til at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at staðfesta staðsetingina, sum byggi- og býarskipanardeildina hevur víst á við Karlamagnusarbreyt í Hoyvíkshaganum, og á fíggjarnevndina um at útvega lendi.

**Sosiala nevnd 4. desember 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd, og at játta kr. 3.000.000,00 av íløgum 2008.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti**
Arkitektar 99, sum fekk arbeiðið at projektera verkætlanina er farið undir arbeiðið, men av tí at fíggjarligu fyritreytirnar eru so nógv broyttar, síðani byrjað varð at fyrireika verkætlanina, eru Arkitektar 99 bidnir um fyribils at steðga arbeiðinum. Apoteksverkið er kunnað um støðuna og tekur undir við avgerðini fyribils at steðga.

Sum partur av verkætlanini var ætlanin at loysa hølistørvin hjá heilsufrøðingunum, sum kommunan hevur lógarálagda skyldu at røkja. Finnast má tí ein onnur loysn á hesum máli.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, sum eisini er formaður í bygginevndini, mælir til fyribils at steðga við projekteringini, og at 1 mill. kr. av játtaðu upphæddini verða brúktar at loysa hølistørvin hjá heilsufrøðingunum, sum kommunan sambært lóg hevur skyldu til at útvega hølir.

**Sosiala nevnd 12. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd at steðga projekteringini. Spurningur í sambandi við játtaðu upphæddini verður tikið upp aftur.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**110/09** **<u>2009-0362</u>**

**<u>Víðkan av rampuni undir havnarskrivstovuni.</u>**

Verandi rampa undir havnarskrivstovuni er bygd í 1975, og er hon 16 m breið og 11 metur long..

Í 2005 vóru smávegis umvælingar gjørdar á rampuna, umframt at botnurin bleiv tryggjaður móti undirmating.

Rampan hevur ein gamlan skaða í pelunum, sum eru undir sjóvarmálanum, sum tað einaferð verður neyðugt at umvæla.

Tað er oftani, at bæði Smyril og Norrøna eru í Havn samstundis, og liggur tá annað skipið undir havnarskrivstovuni og hitt undir farstøðini.

Tá tað er nógvur vindur av vestri ella útsynningi, vilja bæði skipini liggja undir havnarskrivstovuni, tí har er betur at koma til og frá á teimum ættunum.

**Rampan:**
Verandi rampa er 16 m breið. Hetta merkir, at Smyril bert fær annað portrið niður, men annars passar rampan rímiliga væl í hædd.

Tað er straks verri, tá Norrøna skal brúka rampuna, tí tá hongur hon einar 10-12 metrar útav. Hetta ger, at tað stendur nógv á rampuni, sum kann fáa skaða. Verandi rampa passar illa í hædd, og hetta ger tað sera trupult at koyra um rampuna, at avgreiðslan gongur sera seint og at botnurin á akførunum javnan tekur í.

Onnur ro-ro skip hava eisini trupult við at brúka rampuna, tí hon er ov smøl, og portrið kemur sostatt at hanga útav.
Til ber at bøta um hetta við at gera rampuna størri.

Um rampan verður breiðkað upp til 25 m, er hetta mett at kosta 7 mió.

Um rampan harumframt eisini verður longd fram við molanum við 6 m, er hetta mett at kosta tilsamans 13 mió.

Ein leinging av rampuni við 6 m ger at vit fáa eina nógv betur rampu, har øll rampan er nýggj, og at umstøðurnar at koyra í land eru nógv betur enn við tí minnu rampuni.

**Fendarar og pullartar:**
Verandi fendarar eru so lágir, at teir koma ikki upp til skipsfendararnar, sum eru ætlaðir at verða tað fyrsta sum tekur, tá skipið kemur til bryggju. Hetta ger, at skipini eru sera útsett fyri at fáa skaða, tá veðrið ikki er til vildar.

Tað ber til at bøta um hetta við at gera sama slag fendarar, sum teir ið eru undir farstøðini.

Tað er ikki heilt vist, hvussu stórur tann aftari pullarturin er, men mett verður, at hann kann brúkast, um nakað verður gjørt afturat honum.

Neyðugt er at gera ein nýggjan 150 ts pullart framman, sum er so høgur, at ferðslan á bryggjuni kann koyra undir.

Tann umtalaða byggingin av rampuni o.ø., skuldi verið væl egnað hjá øllum øðrum ro-ro skipum og ikki bara til verandi skipaferðslu við teirri avmarking, at dýpið er umleið 7 m

Kostnaðurin fyri pullart og fendarar er mettur til kr. 4,5 mió.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum**
Mælt verður til at gera skitsuprojekt og nýggja kostnaðarmeting til rampu, fendarar og pullartar, og at býraðið velur lim í bygginevndina.

**Havnarnevndin 9. februar 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 19. februar 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Jákup Símun Simonsen og Vagnur Johannesen í bygginevndina.

**Ískoyti:**
Vísandi til reglugerð fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal byggi- og býarskipanarnevndin góðkenna byggilendi. Gjørt verður vart við, at breiðkanin av rampuni hevur ávirkan á kapppróðrarøkið soleiðis, at pláss verður fyri einum báti minni á kapppróðrarøkinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. mai 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við samtyktini hjá Havnarnevndini 9. februar 2009.

**Dispositiónsuppskot:**
Bygginevndin mælir til at breiðka rampuna til 25 m, og at longja hana við 6 m fram við molanum. Hendan loysnin ger, at tað verður nógv betur at koyra í land, at øll rampan verður nýggj, og at tað eisini verður fult dýpi framman fyri rampuna.
At gera 2 stk. 150 tons pullartar.
At gera nýggjar fendarar, av sama slagi, sum undir farstøðini.

LBF kann projektera og bjóða arbeiðið út fyri ein fastan prís upp á kr. 460.000,-.
Harumframt eru teir sinnaðir at standa fyri projektuppfylgjing, byggileiðslu og fakeftirliti fyri kr. 365.000,-

Kostnaðarmetingin fyri arbeiðið, íroknað projektering, eftirlit og óvantað, er 17,5 mió.

**Tilmæli frá bygginevndini**:
Bygginevndin mælir til at taka undir við dispositiónsuppskotinum.

Eisini verður mælt til, at játta kr. 460.000,- til projektering.

**Havnarnevndin 18. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**111/09** **2009-1315**

**Ársroknskapurin fyri 2008 hjá Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av, at liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Framlagt og verður tikið upp aftur á eyka fíggjarnevndarfundi áðrenn býráðsfundin 28. mai 2009.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna ársroknskapin.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**112/09** **2009-1317**

**Grannskoðarafrágreiðing fyri 2008 hjá Tórshavnar kommunu**

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Framløgd og verður tikin upp aftur á eyka fíggjarnevndarfundi áðrenn býráðsfundin 28. mai 2009.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Framlagt.

**Býráðið 28. mai 2009:** Framlagt.

**113/09** **<u>2009-1224</u>**

**<u>Uppskot til roknskapin 2008 hjá Tórshavnar havn</u>**

**Havnarnevndin 18. mai 2009:** Góðkent og samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at góðkenna roknskapin.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við Havnarnevndini.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**114/09** **<u>2009-1225</u>**

**<u>Grannskoðanarfrágreiðing 2008 hjá Tórshavnar havn</u>**

**Havnarnevndin 18. mai 2009:** Framløgd. Samtykt at leggja grannskoðarafrágreiðingina fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 28. mai 2009:** Framlagt.

**115/09** **<u>2009-1431</u>**

**<u>Val av grannskoðara</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
§ 46 í kommunustýrislógini. Í sambandi við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur. *Stk. 2.* Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Framlagt og verður tikið upp aftur á eyka fíggjarnevndarfundi áðrenn býráðsfundin 28. mai 2009.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at grannskoðarin heldur fram.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt, uttan atkvøðugreiðslu, at SPEKT heldur fram sum grannskoðari.

**116/09 2009-1317**

**Fíggjarætlan 2009 - framflytingar.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrislógini kann kommunustýrið, um neyðugt, veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.
Játtanarreglurnar hjá kommununi áseta, at minni- og meirnýtsla kann flytast fram fyri ávísar deildir og stovnar.

Við árslok 2008 vóru netto 146.335 tkr. at flyta fram sum ikki brúkt játtan.

| Endamál | Broyting á konto | | Upphædd |
|---|---|---|---|
| Trivnaðarfyrisitingin | 02 | tkr | 101 |
| Tekniska fyrisitingin | 03 | - | 900 |
| Vegir og gøtur | 11 | - | -1.590 |
| Umhvørvismál | 12 | - | 688 |
| Vatn og gøtuljós | 14 | - | 169 |
| Brennistøðin | 15 | - | 4.790 |
| Asfalt, ferðsla o.a. | 16 | - | 615 |
| Sløkkiliðið/verkstaðið | 19 | - | 1.681 |
| Hests skúli | 20 | - | 23 |
| Nólsoyar skúli | 21 | - | -77 |
| Velbastaðar skúli | 22 | - | -153 |
| Kaldbaks skúli | 23 | - | 43 |
| Kollafjarðar skúli | 24 | - | -356 |
| Høllin í Kollafirði | 241 | - | 518 |
| Kommunuskúlin | 25 | - | 429 |
| Venjingarskúlin | 26 | - | -594 |
| Eysturskúlin | 27 | - | 77 |
| Sankta Frans skúli | 28 | - | -108 |
| Hoyvíkar skúli | 29 | - | 31 |
| Argja skúli | 30 | - | -146 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 310 | - | 166 |
| Kvøldskúlin | 31 | - | 750 |
| Býarsavnið | 34 | - | 898 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Býarbókasavnið | 35 | - | 1.248 |
| Svimjihøllin | 36 | - | -479 |
| Stadionøkið | 37 | - | 1.125 |
| Badmintonhøllin | 39 | - | 152 |
| Frílendisdeildin | 38 | - | 377 |
| Tannlæknastovan | 42 | - | -316 |
| Dagtilhald í Nólsoy | 44 | - | 0 |
| Tilhaldið í Tórsgøtu | 44 | - | 23 |
| Barnaansing | 599 | | 1.029 |
| Mennandi tiltøk | 60 | - | 390 |
| Gamla Havnin | 60 | - | 497 |
| Vinnuverkætlanir | 60 | - | 267 |
| Útveganir | 63 | - | -625 |
| Íløgustuðul | 64 | - | 1.862 |
| Útskiftan av amboðum | 68 | - | -5.987 |
| Nýútvegan av amboðum | 69 | | 86 |
| Umsiting av bygningum | 82 | - | 2.433 |
| Reguleringskonto | 66 | - | 2.315 |
| Íløgur | 90 | - | 131.175 |
| Barnaansing | | - | 1.908 |
| Framfluttar játtanir íalt frá 2008 | tkr. | | 146.335 |

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Framlagt og verður tikin upp aftur á eyka fíggjarnevndarfundi áðrenn býráðsfundin 28. mai 2009.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna framflytingarnar sum eykajáttanir.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**117/09** **2007-0649**

**Kloakk í Skraddaragøtu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sum ein partur av reinsan av Hoydalsá er gerð av nýggjari kloakk við pumpubrunum við Skraddaragøtu. Hetta var ætlað at fíggja av rakstri, men vegna broytan av projektinum, bleiv hetta meira umfatandi og verður tað neyðugt at fáa hetta undir kloakkíløgur fyri 2009.

Biðið verður um at projektið kann verða boðið út í innbodnari lisitatión og at játtað verður kr. 150.000 til projektering og at gera klárt til útbjóðing.

Eisini verður biðið um at fáa broytt raðfestingina fyri kloakkíløgur fyri 2009, nú játtanin er skerd niður til kr. 7.230.000,- og tí ikki fíggjarorka er til ætlanina fyri 2009.

Umsitingin greiðir frá fíggjarligu viðurskiftunum innan avsettum íløgum fyri kloakkir í 2009. Víst verður annars til skjal nr. 2007-0649/1

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við uppskotinum og játta nevndu upphædd og fíggja av íløgum fyri kloakkir í 2009 og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 14. mai 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd at játta kr. 150.000 til projektering og at bjóða arbeiðið út.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**118/09** **2008-3945**

**Rættará, niðasti partur**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Vísandi til heildarætlanina "Reinsan av vestaru vág" vantar at gera kloakkarbeiðið frá Seturstovninum og oman til Skálatrøð.

Arbeiðið fevnir um leggjan av nýggjari kloakkleiðing við pumpubrunni, ið verður leidd heim til Bøgøtu. Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión fyrst í 2009.

**Fíggjarviðurskifti:**
Sambært yvirlitinum eru avsettar kr. 1.000.000,- fyri árið 2008.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at Sp/f Martin E. Leo ger projekt og kostnaðarmeting klárt til útbjóðing og at játta kr. 350.000,- til endamálið.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Projekteringin er liðug, og var arbeiðið boðið út til 8 arbeiðistakarar. Lisitatiónin var hildin tann 7. mai 2009, kl.16.00, á teknistovuni hjá Martin E. Leo. Inn komu 7 tilboð og hevði Andreas Berg lægsta tilboðið uppá kr. 2.460.290,00. Víst verður til skjal nr. 2008-3945/6

Tilboðið er kannað, og verður mælt til at tikið verður við tilboðnum frá Andreas Berg.

Samlað kostnaðarmeting fyri arbeiði:

| | | |
|---|---|---|
| Tilboð frá sp/f Andreas Berg | kr. | 2.460.290,00 |
| Òkent. | kr. | 300.000,00 |
| Uppmáting- Projekt-Eftirlit | kr. | 570.000,00 |
| MVG 6,25%. | kr. | 208.143,00 |
| Mettur kostnaður samanlagt | kr. | 3.538.433,00 |
| | | |
| Àður játtað. | kr. | 350.000,00 |
| | | |
| Biðið verður um | kr. | 3.188.433,00 |

Umsitingin greiðir frá fíggjarligu viðurskiftunum innan avsettum íløgum fyri kloakkir í 2009. Víst verður annars til skjal nr. 2008-3945/4.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við uppskotinum og játta nevndu upphædd og fíggja av íløgum fyri kloakkir í 2009 og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 14. mai 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og taka av tilboðnum frá Andreas Berg og játta kr. 3.188.433,00 av íløgum fyri kloakkir í 2009.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**119/09** **<u>2009-0995</u>**

**Fígging av meirkostnað í sambandi við projektering av vatnverki í Havnardali**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Projekteringin "2004-0389" av nýggjum vatnreinsiverki í Havnardali er liðug, og smb. P/F Sofus M. Jakobsen er projektið so fullfíggjað, at tað kann nýtast sum útbjóðingartilfar.

Í kommunalu íløguætlanini er projektið útsett til 2012.

Konto 90-14905 "Nýtt vatnverk í Havnardali" er "yvirtrekt" við kr. 180.204.

Orsøkin til hesa meirnýtslu er, at leiðslan metti, at best var at fáa projektið liðugt, nú so lítið vantaði í, og at víðari framhald av hesi ætlan varð útsett til 2012.

Á fundi hjá borgmeistaranum 19. mars 2009, kunnaði bygginevndin fyri reinsiverkið í Havnardali borgarstjóran og kommunustjóran um gongdina í verkætlanini samb. § 10 í fundarskipanini fyri bygginevndir.

Fyri at fíggja hesa meirnýtslu, varð á hesum fundi mælt til at nýta pening av konto 90-14907 "Høvuðsvatnleiðing í atkomuveg". Hetta, tí ikki verður mett at brúk verður fyri hesi uphædd í 2009/2010.

Hetta uppskot varð umrøtt, og varð breið semja um at hetta var ein gongd leið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri vatn- og gøtuljósdeildini mæla til, at tøk upphædd, kr. 181.475 á konto 90-14907 "Vatnleiðing í atkomuveg", verður nýtt til at rinda meirnýtsluna á kr. 180.204 á konto 90-14905 "Nýtt vatnverk í Havnardali".

**Tekniska nevnd 14. mai 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og teknisku nevnd.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**120/09** **2009-0896**

**Valbjørn Dalsgarð P/f: Marknaumskipan millum Valbjørn Dalsgarð P/f, matr. nr. 255, Argir og Tórshavnar kommunu, matr. nr. 4a, Argir - Undir**

**Kongavarða - Glyvursvegur.**

**Lýsing av málinum- samandráttur**
Høgni Lauritsen hevur vegna P/F Valbjørn Dalsgarð víst á tørvin at fáa endligu matrikuleru viðurskiftini viðv útstykkingini undir Kongavarða avgreidd. Hann vísir á, at virkið hevur bíðað í meira enn 1 ár eftir at fáa avgreitt hesi viðurskifti, og sum støðan er nú, fáa vit ikki skrivað endaligu skeytini til keypararnar.

Tað er samstundis týdningarmikið fyri Tórshavnar kommunu at fáa hetta í rættlag, tí sambært verandi matrikulviðurskiftum liggur Glyvursvegur 5. og 6. Byggistig inni á matr. nr. 255, ið er ogn hjá P/F Valbjørn Dalsgarð.

Umsitingin og umboð frá P/F Valbjørn Dalsgarð eru samd um hvussu málið eigur at verða avgreitt, og tíksil eigur tað at verða skjótt at taka avgerð og fáa viðurskiftini í rættlag.

Talan er um uml. 2.195 fermetrar, sum skulu makaskiftast. Tórshavnar kommuna skal lata 2.195 fermetrar av matr. nr. 4b, Argir og fær afturfyri 2.195 fermetrar av 255, Argir. Eigarin av matr. nr. 4b, Argir er Tórshavnar kommuna og av matr. nr 255 er P/F V. Dalsgard.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við uppskotinum um makaskifti og at beina málið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 14. mai 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við uppskotinum um makaskifti og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

Elin Lindenskov var ikki við til at viðgera hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. mai 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**121/09** **2008-3946**

**Reinsiverk við Súpanarvík**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Vísandi til fíggjarætlanina fyri 2008, verður biðið um at arbeiðið við projektering og útbjóðing kann verða gjørt her í heyst. Í hesum sambandi er ætlanin at fáa verandi kloakkútlop, ið er sera vánaligt, gjørt samstundis.

**Fíggjarviðurskifti:**
Til hesi arbeiði er avsett ávikavist kr. 1.300.000,- og kr. 600.000,- fyri 2008.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at Sp/f Martin E. Leo ger projekt og kostnaðarmeting klárt til útbjóðing í september og at játta kr. 200.000,- til endamálið.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Lisitatiónin var hildin hjá Martin E. Leo 9. desember 2008, kl. 11.00 og komu 4 tilboð inn, sí skriv j.nr. 2008- 3946/4. Sp/f Plan v/ Johs. Hellisdal hevði lægsta tilboð, sum var krónur 1.288.421,55. u/ mvg.

Kostnaðarmetingin hjá Martin E. Leo var 1.723.300,00 kr.

Tilboðini eru kannað og verður mælt til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá sp/f Plan v/ Johs. Hellisdal.

**Fíggjarviðurskifti:**
Sum áður víst á, eru samanlagt avsettar í 2008 1.9 mill. kr. til endamálið, og eru áður játtaðar kr. 200.000,00 til projektering.

Samlaður kostnaður við eftirlit,- mvg.og ókendum verður kr. 1.716.821,65. (skjal j. nr. 2008-3946/4)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við tilboðnum frá Sp/f Plan v/ Johs. Hellisdal og at játta kr. 1.525.000,00 av íløgum fyri kloakkir.

**Tekniska nevnd 15. januar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at fíggja av avlopi á íløgum í 2008.

**Býráðið 29. januar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í sambandi við liðuggerð av kloakkarbeiðinum er staðfest, at partar av høvuðskloakkini uttan fyri arbeiðstøkumark er í sera ringum standi. Umsitingin hevur í hesum sambandi móttikið tilboð frá arbeiðstakaranum. Samlaða arbeiðið kemur at kosta. kr. 570.000,- (v 6,25% mvg, projektering v.m). Sambært skjali nr. 2007-0649/3 eru uml. 8,4 mió. kr. tøkar til kloakkarbeiði av íløgum fyri 2009 og gevur hetta sostatt rúm fyri fígging av omanfyri nevnda eykaarbeiði.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 570.000,- til eykaarbeiðið at fíggja av íløgum fyri kloakkir 2009 – kto. 90-1011-11900 og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 14.mai 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**122/09** **<u>2009-1334</u>**

**<u>Uppskot um at krevja depositum fyri at standa á bíðilista til fasta ogn til egnan privatan bústað í Tórshavnar kommunu</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Á bíðilista til grundstykkir, íbúð ella randarhús í Tórshavnar kommunu standa í løtuni umleið 1700 fólk.

Reglurnar fyri at standa á bíðilistanum eru linari enn reglurnar fyri, hvør kann fáa tillutað grundstykki, og talið á umsøkjarum, ið lúka treytirnar fyri tillutan, verður tí mett at vera munin lægri enn talið á umsøkjarum, ið lúka treytirnar fyri at standa á sjálvum bíðilistanum.

Ætlanir eru ikki um at broyta hesi viðurskifti, og tað fer tískil framvegis at bera til hjá eitt nú lesandi og øðrum, sum eru burturstødd úr kommununi í fyribils ørindum og ikki uppfylla treytirnar fyri tillutan, at skriva seg á bíðilistan.

Hildið verður tó, at nógvir umsøkjarar bert standa á listanum, tí hetta er ein møguleiki teir hava, og tí tað er ómakaleyst og ókeypis at standa á bíðilistanum. Kravt verður ikki av fólki, at tey við jøvnum millumbilum endurnýggja umsókn sína, og nógv standa helst á listanum, hóast tey eru flutt úr kommununi og ongar ætlanir hava um at flyta aftur í kommununa.

Hildið verður, at nógvir umsøkjarar ikki høvdu tikið av, um teimum stóð í boði at keypa grundstykki frá Tórshavnar kommunu.

Ein ábending um hetta er seinasta útbjóðingin av grundstykkjum í útstykkingini við Myllutjørn, har áhugin vísti seg at vera sera lítil fyri at ogna sær eitt kommunalt grundstykki. Sama mynd vísti seg í sambandi við, at nøkur størri kommunal grundstykki vórðu boðin út í Kaldbak. Eingin umsøkjari vísti áhuga fyri hesum grundstykkjum.

Tann sannroynd, at ilt er at siga, hvussu stórur veruligi tørvurin á grundstykkjum er, ger tað trupult at planleggja og leggja til rættis framtíðar kommunalar útstykkingar. Veruligi tørvurin er ógreiður, og broytist harumframt støðugt.

Í eini roynd at fáa betri samsvar millum talið á umsøkjarum á listanum og veruliga tørvin á grundstykkjum verður mælt til at krevja eitt depositum frá øllum, ið standa á bíðilistanum í dag, og øllum teimum, sum í framtíðini skriva seg upp á bíðilistan.

Tey, ið meta seg hava ella einaferð í framtíðini fáa ein veruligan tørv á einum kommunalum grundstykki, hava tá møguleika at vera verandi á listanum móti at rinda eitt depositum, meðan tey, ið ikki meta seg hava ella nakrantíð í framtíðini fáa tørv á kommunalum grundstykki, helst fara at lata umsókn sína strika av bíðilistanum.

Tá fæst ein greiðari mynd av veruliga tørvinum á grundstykkjum, og býarplanleggingin gerst lættari og neyvari, tá talan er um at leggja til rættis og greina tørvin á framtíðar kommunalum útstykkingum.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyri standandi mæla kommunustjórin og deildarleiðarin á løgdeildini fíggjarnevndini og býráðnum til at samtykkja, at kravt verður eitt depositum á kr. 5.000,00 fyri hvørt pláss á bíðilistanum til fasta ogn til egnan privatan bústað. Depositum verður endurgoldið, tá viðkomandi fer av aftur bíðilistanum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum, tó so at depositumið verður kr. 3.000,00.

**Býráðið 28. mai 2009:** Atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini sum var samtykt við 10 atkvøðum fyri og 1 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen, Sjúrður Johannesen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl og Ingrid Henriksen. Ímóti atkvøddi Jan Christiansen.

**123/09** **2009-1336**

**Viðvíkjandi grundøkið matr. nr. 1453c, sum Norðurlandahúsið stendur á.**

Tórshavnar kommuna stendur framvegis sum tinglýstur eigari av økinum, sum er til víddar 10.405 fermetrar.

Talan er um gamalt mál, og framgongur í ymiskum skjølum frá 1973, at ætlanin hevur verið at handa økið til Norðurlandahúsið, men er eigaraskiftið sum kunnugt ikki framt í prakis

Sambært útskrift úr gerðabókini hjá fíggjarnevndini dagfest 23. november 1973, hevur nevndin hildið fund um mál viðvíkjandi byggilendi til Norrøna mentunarsetrið í tórshavn.

Endurgivið orðarætt: Til tess at málið um byggjan av slíkum mentunarsetri í Tórshavn skal koma víðari er neyðugt at spurningurin um byggiøkið til setrið verður greiddur og herundir er eisini spurningurin um Tórshavnar kommuna eins og Reykjavíkar kommuna letur økið til norrøna setrið ókeypis.

Samtykt at mæla býráðnum til at samtykkja at lata Norrøna Mentunarsetrinum eitt ókeypis grundstykki o.u 9.000 fermetrar í C2 økinum.

Síðani kann eisini vísast til skriv sum er sent byggi og býarskipanarnevndini 19. desember 1973. Brævið er undirskrivað av Petur Christiansen, formanni,

Sambært hesum brævinum framgongur, at nevndin skjótast til ber eigur at viðgera spurningin um hvar grundøki til Norrøna Mentunarsetri eigur at liggja. Innan C2-økið, og á hvønn hátt kommunan kann ogna sær hetta øki at lata setrinum.

Kommunustjórin hevur havt fund við Niels Halm, sum er leiðari av Norðurlandahúsinum.

Niels Halm varð kunnaður um gomlu samtyktina

Greiða má fáast á hvør ið skal vera juridiskur móttakari av ” gávubrævinum ”

Talan kann vera um Sjálvsognarstovnin, Norðurlandahúsið í Føroyum ella Nordisk Råd ella Nordisk Ministerråd.

Niels Halm vendir aftur til løgdeildina hesum viðvíkjandi.

**Niðurstøða:**
Leiðarin av løgdeildini og kommunustjórin, mæla til at fylgja upprunaligu samtyktini í fíggjarnevndini og býráðnum at lata Norðurlandahúsinum grundøki matr. nr. 1453c, Tórshavn ókeypis.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**124/09** **2009-1368**

**Keyp av matr. nr. 373a & 373c í Tórshavn, t.e. ognirnar við Niels Finsensgøtu 7, har býarbókasavnið o.o. halda til.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Samband hevur verið við umboð fyri sp/f Heim, Eyðfinn Reyðberg, stjóra fyri Norðoya Sparikassa um møguleikar at keypa ognirnar, matr. nr. 373a & 373c í Tórshavn, t.e. ognirnar við Niels Finsensgøtu 7, har býarbókasavnið o.o. halda til.

Býráðið hevur eftir tilmæli frá fíggjarnevndini 29. desember 2008 samtykt at góðtaka uppskotið til 10 ára leigusáttmála, har árliga leigan fyrsta ári er kr. 1.189.708,-.

Útleigarin krevur harumframt hækking uppá 2,5% árliga í mun til leiguna undanfarna ár, tó fyrstu ferð 1. januar 2010.

Nevndin tekur ikki undir við árligari hækking av leiguni uppá 2,5 %, men kann góðtaka at leigan verður prístalsviðgjørd hvønn 1. januar í mun til prístalsgongdina í árinum frammanundan.

Marnar Mortensen, varastjóri í Norðoya Sparikassa hevur góðtikið samtyktina hjá fíggjarnevndini um hækking av leiguni í mun til prístal, í staðin fyri fasta árliga hækking av leiguni uppá 2,5 %, tó krevur Norðoya Sparikassi at leigan ongantíð kann lækka.

Kommunan kann keypa ognirnar fyri 17 mió. kr., Norðoya Sparikassa bjóðar sær til at fíggja part av keypinum t.e. upp til 15 mió. kr., soleiðis at lánsgjaldið fyrstu fimm árini verður ein millón kr., hetta er sama upphædd sum leigan. Aftaná fimm ár skal nýggj avtala gerast um rentur og avdrátt. Rentan fyrstu fimm árini verður sum fyri húsalán, rentan er í løtuni 6%.

Ætlanin er at Býarbókasavnið skal hava alt sítt virksemi í ognunum, tó verða hølini, sum Joto var í leigaði út til handil.

Í sambandi við yvirtøku av ognunum verður neyðugt at umbyggja part av veghæddini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til keypa ognirnar fyri 17 mió. kr., at taka við fíggingartilboðnum frá Norðoya Sparikassa, og at fíggja restina 2 mió. kr. av konto 90.

Eisini verður mælt til at játta upp til 1.5 mió. kr. til umbygging av konto 90.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa bygningin og heimila umsitingini til at fáa fígging til vega til keyp og umvæling. Málið verður lagt fyri fíggjarnevndina og býráðið aftur.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**125/09** **2006-3208**

**Áskoðaraskýlið við leikvøllin á Argjum**

Viðvíkjandi minstukrøvunum hjá UEFA og FSF við leikvøllin á Argjum.

Í sambandi við minstukrøvini hjá UEFA, og at Argja Bóltfelag er flutt upp í Formuladeildina, eru nøkur viðurskifti við leikvøllin, sum mugu gerast áðrenn kappingarárið 2009 byrjar.

Eitt av krøvunum er, at tað eru í minsta lagi 300 setur til áskoðararnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini, byggideildini og mentamáladeildini, at gera kanningar at nøkta viðurskiftini sambært krøvum frá Fótbóltssamband Føroya.

**Mentamálanevndin 29. oktober 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Uppískoyti:**

Eitt skitsuuppskot er gjørt av áskoðaraskýlinum við leikvøllin á Argjum, sum hevur áskoðarapláss, við taki, til umleið 370 fólk og kann skýlið gerast í tveimum byggistigum (yvir tvey ár).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðari mæla til at játta, í 2009, 2,5 mió. kr. av konto 37 á fíggjarárinum 2009.

**Mentamálanevndin 12. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Uppískoyti:**
Til tess at tryggja, at áskoðaraskýlið á Argjum verður gjørt liðugt áðrenn næsta kappingarár, er neyðugt at fáa til vega 2,8 mió kr. afturat teimum 2,5 mió kr., sum áður eru játtaðar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 2,8 mió kr. av íløgum á trivnaðarøkinum, ætlaðar Eysturskúlanum í 2010, til áskoðaraskýlið við fótbóltsvøllin á Argjum.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta 2,8 mió kr. av íløgum á trivnaðarøkinum, ætlaðar Eysturskúlanum í 2010.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta 2,8 mió kr. av íløgum á trivnaðarøkinum í 2010.

**Býráðið 28. mai 2009:** atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini sum var samtykt við 10 atkvøðum fyri og 1 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen, Sjúrður Johannesen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl og Jan Christiansen. Ímóti atkvøddi Ingrid Henriksen.

**126/09** **2009-1391**

**Útbygging av Hoyvíkshøllini**

**Málslýsing:**
Hoyvíkshøllin varð tikin í nýtslu í 2002. Neyðugt er við dagføring av høllini m.a. tí hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi. Talan er m.a. um umklæðingarrúm, wc og gongd, sum eru ov smá. Eisini er tørvur á einum duri, soleiðis at fólk ikki koma

beint inn í høllina uttanífrá. Í sambandi við nevndu dagføring skal gerast ein lýsing av tørvinum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 100.000 kr. av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi, til at lýsa tørvin á at dagføra Hoyvíkshøllina og gera kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 til at lýsa tørvin á at dagføra høllina og gera kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 0 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen, Sjúrður Johannesen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl. Ingrid Henriksen og Jan Christiansen greiddu ikki atkvøðu.

**127/09** **1999-0345**

**Høllin á Hálsi**

Á fundi í býráðnum 23. september 2004 varð m.a. samtykt at gera eina byggitekniska meting av høllini.

Byggideildin hevur havt samstarv við BBP Arkitektar A/S um at útbyggja og umvæla høllina. Byggideildin hevur á fundi í býráðnum 30. mars 2006 kunnað um ætlaðu umbyggingina av Ítróttarhøllini á Hálsi.

Í uppskotinum er ein kostnaðarætlan og ein tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fara undir at gera hesa verkætlanina so skjótt sum til ber. Tað kann ikki metast ráðiligt at halda fram við at lappa uppá verandi høll. Ei heldur má tað metast ráðiligt at fara undir at umvæla høllina bert fyri at fáa hana í brúkiligan stand tó uttan at tillaga hana til øktan tørv og krøv til nýtslu.

Høllin á Hálsi hevur altíð staðið sum ímyndin av føroyskum innanduraítrótti, harumframt at vera stoltleikin fyri samkomu- og ítróttarvirksemi í Tórshavn. Hetta eigur Tórshavnar kommuna, sum landsins høvuðsstaður at leggja seg eftir at kunna siga um Høllina á Hálsi framyvir.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir mentamálanevndini til at taka undir við tilráðingini frá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Nevndin var á staðnum og var víst runt í høllini.

**Uppískoyti/tilmæli:**
Høllin, ið er yvirtikin av Tórshavnar kommunu fyrst í 2005, er niðurslitin, og tørvar átrokandi ábøtur. Fyri at fáa sum mest burtur úr eini so umfatandi umvæling, hava vit mett rættast eisini at hava við í hesum arbeiði eina dagføring av høllini, ið alt annað enn líkur krøvini, ið eru til eina tílíka høll í dag. Tí fyriliggur eitt skitsuuppskot, sum tekur støði í hesum. Atlit eru eisini tikin til, at hon framhaldandi, eftir at arbeiðið er gjørt, fer at verða "høllin" í Føroyum. Býararkitekturin hevur sagt um skitsuuppskotið, at hetta er eitt av teimum betru.

Í skitsuuppskotinum er samantvinna umbygging, uppíbygging og umvæling. Sambært kostnaðarmetingini hjá BBP-arkitektum kostar arbeiðið kr. 32.850.000 (danskir prísir, primo 2006)

Afturat hesum kemur projekterings- og ráðgevaraútreiðslur, kr. 3.942.000 (12% av 32 mill kr.).
Av tí at uppskotið ikki bert inniheldur viðlíkahald, men eisini uppíbygging v.m., halda vit tað er rætt eisini at býta samlaða metingina upp í tveir partar. Annar er umvælingarparturin og hin er uppí- og umbyggingar parturin.

Út frá kostnaðarmetingini kemur fram, at kostnaðurin fyri alt arbeiðið er í "føroyskum kr" 37.777.500 mill. kr. Deila vit hetta upp í áður umtalaðu partar, fáa vit hesa uppdeiling:

| | | |
|---|---|---|
| Umvæling | kr. | 21.903.095 |
| Uppí- og umbygging | - | 15.874.405 |
| Samlað | kr. | 37.777.500 |

Í fjør játtaði býráðið 2,5 mill. kr. á konto 82 til Høllina á Hálsi at gera umvælingar fyri í 2006.

Býararkitekturin mælir til at tikið verður av øðrum av niðanfyri standandi tilmælum. Bæði ganga uppá at fáa sett projekteringsarbeiði í gongd nú.

Í tí fyrra tilmælinum verður mælt til, at arbeiðið verður gjørt út í eitt. Hetta hevur

við sær, at eingin kann brúka høllina í byggitíðini, sum ætlandi verður liðug í september 2008.

Tað seinra mælir til, at arbeiðini verða gjørt í 4 byggistigum, soleiðis at yvir eitt rímiligt tíðarskeið stendur høllin liðug, sum skitsuuppskotið leggur upp til.

**1. tilmæli**

at projekteringin av skitsuuppskotinum verður gjørt av BBP-arkitektum, sum hava tillagað eina nýggja tíðarætlan. Teir kunnu byrja uppá projekteringina miðjan august í ár og hava hana lidna miðjan mai 2007. Arbeiðið kann byrja fyrst i juli 2007 og halda fram, til tað er liðugt, áðrenn hondbóltskappingin byrjar aftur í september 2008.

at játtanin til konto 82 verður hækkað við teim knapt 22 mill. kr., og tær írestandi knapt 16 mill. kr. sum íløga ella tiknar sum lán. Projekteringskostnaðurin verður goldin av teim 2,5 mill. kr., sum eru á konto 82, og tær írestandi 1,4 mill. kr. verða deildar soleiðis, at 1 mill. fer til konto 82 og 0,4 mill. kr. sum íløga ella lán. Sett upp í skema sær tað soleiðis út yvir 2 fíggjarár:

| | | |
|---|---|---|
| Hækka játtaninna til konto 82 | kr. | 21.903.095 |
| Partur av projekterings og ráðgeving | - | 1.000.000 |
| Samlað hækking til konto 82 | kr. | 22.903.095 |
| | | |
| Játtan til íløgu ella at upptaka lán | kr | 15.874.405 |
| Partur av projektering og ráðgeving | - | 442.000 |
| Samlað íløga ella lántøka | kr. | 16.316.405 |

Hækkan av játtan til konto 82 og játtan til íløgu ella lántøka verða gjørd yvir eitt tvey ára skeið, so hvørt sum tørvur er á peningi.

| | | |
|---|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2007 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 12.000.000 |
| Og íløga ella lántøka verða gjørd fyri fíggjarárið 2007 við | kr. | 8.000.000 |
| Fyri fíggjarárið 2008 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 11.000.000 |
| Og íløgan ella lántøka verður gjørd fyri fíggjarárið 2008 við | kr. | 9.000.000 |



| | |
|---|---|
| tíðarskeið<br>Arbeiðið<br>endar | |

Omanfyri sæst tíðaraksin fyri projektering og byggitíðina, um arbeiðið verður gjørt út í eitt.

**2. tilmæli**
Í øðrum lagið verður mælt til at projektið verður gjørt liðugt, soleiðis at partar av arbeiðnum kunnu longu byrja í 2007. Arbeiðið kann tá leggjast soleiðis tilrættis, at tað verður boðið út í størri og minni bitum alt eftir tí, sum er best byggitekniskt, og sum pengar verða settir av til.

at peningur verður settur av soleiðis, at projekteringin kann gerast liðug av BBP-arkitektum miðskeiðis í apríl 2007. Hetta fyri at umvælingararbeiðið kann gerast við støði í tí lidna projektinum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt í størri og smærri bitum.

at peningur verður settur av til at gera 1. byggistig í fyrstu atløgu, sum umfatar rúmini á eystursíðuna fyrst. Hetta inniheldur at skifta takið, hækka gólvið á hædd við vallargólvið, umvæla og broyta skiftirúmini, wc rúmini og harvið eisini gera kloakkina á nýggjum og asfaltera gongubreytuna. Framsíðan skal gerast eftir tí nýggja uppskotinum, tvs. skifta klædningin út og skifta og broyta vindeyguni og úthurðarnar. Seta nýggja takrennu og rennustokk upp. Hesi arbeiði kunnu gerast við at hækka játtanina til konto 82 við 9 mill. kr. til fíggjarárið 2007.

Ein møgulig langtíðar ætlan kundi verið hendan.

**1. byggistig**
Umvæling og broyting av hølum, ið liggja úti við eystur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar. Takið skal eisini skiftast.

**2. byggistig**
Útbyggja endan norðureftir, við øllum.

**3. byggistig**
Útbyggja endan suður eftir við øllum.

**4. byggistig**
Taka niður áskoðarabeinkirnar og flyta vøllin inn í mittuna. Gera nýggj áskoðarapláss og umskapa rúmini, sum liggja út til vestur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um

fíggjarnevndina, at 2,5 mió. kr., sum eru játtaðar til umvælingar av høllini 2006, verða nýttar til projektering av umvæling og umbygging, sambært uppskoti frá BBP Arkitektar A/S, februar 2006.

Eisini samtykt at viðgera málið aftur í mentamálanevndini eftir summarfrítíðina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini vóru á fundinum og greiddu frá.

Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Nýtt:**
Kommunan hevur arbeitt við einum projektið, ið fór at kosta 40 mill kr. umframt projekteringsútreiðslur.

Projekteringin er komin væl áleiðis og sambært sáttmála millum arkitektavirkið og Tórshavnar kommunu (TK) skal projektforslagið góðkennast av TK. Hetta liggur nú klárt til góðkenningar

Samlaði kostnaður fyri projektið er kr 47.680.000 við prístalsregulering og projektering.

Arbeiði gerast í 4 byggistigum.

| | |
|---|---|
| 1. byggistig: | 1. februar 2008 – 31.oktober 2008 |
| 2. byggistig: | 1. januar 2009 – 1. februar 2010 |
| 3. byggistig: | 1. apríl – 27. august 2010 |
| 4. byggistig: | 1. september – 30. juni 2011 |

Arbeiði verður fíggja av konto 90 soleiðis:

| | |
|---|---|
| Áður játtað, | 2.500.000 mill kr. |
| At játtað fyri 2007 | 6.000.000 mill kr |
| At játtað fyri 2008 | 6.415.000 mill kr |
| At játtað fyri 2009 | 14.326.680 mill kr |
| At játtað fyri 2010 | 12.829.240 mill kr |
| At játtað fyri 2011 | 5.599.080 mill kr |

Býararkitekturin mælir til at projektuppskotið, tíðarætlan og fíggingar-háttur verða góðtikin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá

býararkitektinum. Somuleiðis verður mælt til at seta bygginevnd fyri verkætlanina, sambært ”Politisku/fyrisitingarligu mannagondir fyri verkætlanir”

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
5 byggifyritøkur vóru innboðnar til at prekvalifisera seg til at bjóða uppá út-og umbyggingina av Høllini á Hálsi. Freistin at lata inn upplýsningar um fyritøkuna varð 6. mars kl 14.00. Av teim 5 boðnu, lótu 4 fyritøkur inn tilfar, og vóru tær allar góðkendar.

Lisitatiónin varð 28. apríl 2008 kl 10:00
Hesi tilboð komu inn

| Fyritøka | 1 byggistig | 3 byggistig |
|---|---|---|
| J & K Petersen Contractors | Einki boð | Einki boð |
| Búsetur Sp/F | kr 58.798.462,80 | kr 64.143.777,60 |
| E.Pihl & Søn Føroyar P/F | kr 64.341.329,28 | kr 69.964.259,00 |
| MT Højgaard Føroyar P/F | kr 70.810.793,03 | kr 76.310.793,03 |

Ráðgevarin BBP-arkitekter, mettu at øll innkomnu tilboð vóru kontosiónsmessig. Víðari mæltu ráðgevin til at tikið varð av tilboðnum frá Búsetur, og at arbeiðið skuldi gerast í einum byggistigi.

Bygginevndin gjørdi hetta tilmæli.

Ein meiriluti í bygginevndin, mælir frá at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 58.798.462,00 kr, fyri at gera arbeiði í einum. Somuleiðis mælir ein meiriluti frá, at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 64.143.777,00 kr, fyri at gera arbeiðið í stigum.

Grundgevingin fyri frámælinum er, at játtaðar eru bert 48 mill. kr. til at gera arbeiðið í stigum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini vísandi til at rúm ikki er fyri verkætlanini á konto 90.

**Mentamálanevndin 3. desember 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 29. desember 2008:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen

**Uppískoyti:**
Høllin, sum Tórshavnar kommuna yvirtók í 2005, er niðurslitin og tørvar átrokandi ábøtur. Arbeitt hevur verið við at fara undir útbygging av høllini, men býráðið samtykti 29. desember 2008, at arbeiðið verður ikki gjørt í hesum umfari.

Tørvurin á umvælingum í høllini er stórur, og tí verður neyðugt at gera eina tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at framflyta kr.100.000 av játtan til umbygging av høllini á Hálsi til at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum við kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**128/09** **<u>2009-0278</u>**

**Val av ferðslunevnd**

**Býráðið 29. januar 2009:** Tikið av skrá.

**Býráðið 19. februar 2009:** Tikið av skrá

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu, at deildarleiðarin fyri Plan- & rakstrardeildina er fastur limur.

**FUNDUR LOKIN KL. 20.00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Ingrid Henriksen |
| Annfinn Brekkstein | Inga Dahl | Sjúrður Johannesen |
| | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |